# KFUM Skótarnir

Landsfundarblað 2024



# VÆLKOMIN Á LANDSFUND 2024

Eg skal, vegna landsnevndina og KFUM – skótarnar í Føroyum, bjóða tykkum vælkomin á landsfund í KFUM í Havn leygardagin 24. februar.

Landsfundurin byrjar kl. 10 og heldur fram allan dagin.

Árið hevur gingið væl, og nú vísa okkara limatøl ein vøkstur. Hetta er tykkum úti í bólkunum at takka. Takk fyri tykkara góða arbeiði.
Vit hava í ár fyri fyrstu ferð ROLAND 1 á skránni. Hetta hoyra vit nærri um.

Vit hava avbjóðingar við at fáa leiðslur til ymisku legurnar og skeiðini hjá samskipanini. Tað hevur við sær, at vit mugu flyta legur og skeið. Hetta er sera harmiligt, men vit skulu hugsa, at okkara arbeiði er sjálvboðið, so tað er ein partur av tí.

Spennandi er eisini at frætta frá bólkunum, hvat teir takast við.

VER TIL REIÐAR

Við skótakvøðu
Steinbjørn V. Olsen
Skótaovasti
KFUM – skótarnir í Føroyum







# Landsfundurin
# Hjá KFUM Skótinum í Føroyum



24
Feburar

8:30 - 17:00
KFUM í Tórshavn
Tilmelda áðrenn 17. Feburar
á Skoti.fo

"THE OPEN-AIR IS THE REAL OBJECTIVE OF SCOUTING AND THE KEY TO ITS SUCCESS."



# Landsnevnarfrágreiðing

**Fíggjarstøðan:**
KFUM – skótarnir í Føroyum eru nú væl fyri fíggjarliga. Men tað krevur, at tað verður stýrt skynsamt, og vit ikki brúka pengar óneyðugt.

**Venjingar:**
Venjingar og skeið hava verið útsett vegna serligar umstøður hjá fyrireikarum, men verða nú hildnar.

Hetta snýr seg um leiðarabyrjan, úlvaleiðaraskeið og PF-venjingina.

KFUM-skótarnir hava eina góða venjingarætlan og virknisætlan, so at okkara skótar verða væl fyri. Vit vóna at síggja fólk frá øllum bólkunum til okkara skeiðs- og venjingarvirksemi.

Skjaldrasveinur, Paladin, LPK, Riddaravenjingin og Krossriddara-venjingin hava verið hildnar sum vant við nógvum góðum upplivingum. Takk fyri, tit, ið fyrireika alt hetta stóra arbeiði.

**FSR:**
Steinbjørn og Jóhan eru okkara umboð í FSR

**Limaskipanin - Heimasíðan:**
Nú hava vit so endiliga fingið okkara limaskipan, og landsnevndin vil gjarna takka Helmu Mariu Tróndheim fyri eitt megnar arbeiði saman við Sóley. Takk fyri, tit.
Tað er nógv, sum vit skulu fáa at ganga saman og eisini við okkara nýggju heimasíðu.

So eg vil inniliga heita á bólkar um at senda tilfar inn, sum tit ynskja á heimasíðuna. Landsnevndin hevur ongan møguleika at gera hetta einsamøll. Vit hava øll okkara dagliga arbeiði eisini at fyrihalda okkum til.

**Vælkomin til Skótabólkin Nykurs Rósa:**
Í mars vóru vit 11 skótabólkar kring landið. Hetta er at gleðast um, so hjartaliga vælkomin til skótabólk Nykurs Rósa av Sandi.



# SKRÁ

| | |
|---|---|
| Morgunmatur | 8:30-9:30 |
| Landsfundur settur<br>• Val av fundastjóra<br>• Góðkenning av mynstringalista<br>• áseta gyldigum atkvøðum | 9:30 |
| Frágreiðing frá Landsnevndini | |
| Grannskoðaur rokniskapur lagdur fram | |
| Døguri | 12:00-13:00 |
| Frágreiðing frá bólkunum | |
| limagjald | |
| Innkomin mál<br>broytingar av grundlóg og viðtøkum | |
| val av limun og grandskoðara | |
| Ymiskt | Fundurin lokin kl 17 |

# FRÁGREIÐING FRÁ *Menningarnevndini*



**Úlvavenjingin:**
Venjingin er rættlisin, og merkini eru nú á gáttini til at vera sett í gerð. Hetta er ein stórur fíggjarligur biti, sum vit mugu finna fígging til. Skipanin er væl gjørd, og vit vóna, at leiðarar taka hana til sín.

**Skótavenjingin:**
Nevndin hevur eftirhugt skótavenjingini og rætta hana til, so at hon hækkar í dygd í mun til, hvussu hon var. Vit leggja hetta fram á landsfundinum saman við okkara og tykkara hugsanum.



**Fyri framman:**
Tað, sum liggur fyri framman hjá nevndini, er at fáa sett úlvavenjingina í verk, og at vit fara at hyggja eftir, hvussu vit kunnu fáa fleiri leiðarar við, og at hesir fáa eina so góða útbúgving sum gjørligt. Men tá krevst eisini, at bólkarnir eggja sínum leiðarum at koma á skeiðini og til venjingarnar hjá samskipanini.

Við skótakvøðu
Steinbjørn V. Olsen
Skótaovasti & formaður í
Menningarnevndini




Uppliv skótalívið




# Frágreiðing frá Virkisnevndini

Í virkisnevndini sita Jóhan N. Kass, fyri landsnevndina, Hjørdis Johannesen og Oda Maria Johannesen. Eyðfríð Sigurstein var eisini, men mátti trekkja seg úr landsnevndini og virkisnevndini. Eingin er komin fyri hana.

Eftirsum tað var so stutt tíð til LPK'ina eftir at nevndin var mannað, valdu vit at fyrireika hana sjálvi. Hetta gekk væl, av tí at vit øll hava roynt tað fyrr. Og vit halda at legan gekk sera væl, hóast veðrið ikki var tað besta alla tíðina. Til eftirmetingina, vórðu vit samd um, at skemaði ikki skal vera líka fult, soleiðis at luttakararnir hava tí røttu tíðina at gera sær mat, og soleiðis at alt ikki verður órógva av at onkur kapping ella annað verður seinkað.

Eftirsum LPK-vinningurin bleiv vunnin til ognar, hava vit funnið ein nýggjan vinning, sum er í gerð. Eftir LPK, blivu restin av tiltøkunum, sum virkisnevndin hevur ábyrgd av, deild okkara millum at hava ábyrgd av. Hetta riggaði væl, soleiðis at øll nevndin ikki situr við øllum tiltøkum. Hjørdis og Jóhan tóku sær so av tiltøkunum, sum vóru ætlað Eyðfríð, uttan trupuleika.

Vit fóru aftur til at riddara- og krossriddaravenjingarnar koyrdu hvør sær. Hóast tað krevur leiðarar til tvey vikuskiftir í staðin fyri eitt, hildu vit, tað gekk nógv betur.

Í løtuni verður fyrireika til Skjaldrasvein, sum verður í Kvívík eins og fjør, eftirsum fyrireikararnir vóru væl nøgdir við umstøðunar. Jóhan og Hjørdis hava havt tveir fundir við fyrireikararnar. Tey eru dugnalig, og tað sær út til, at tey hava stýr uppá tingini.

Í mun til LPK í ár, so kemur tað eisini at vera ein DPK og hon fer at vera ein leygardag, og vit hava møguliga funnið fyrireikarar til hetta.

Jóhan N. Kass
Virkisnevndin

## ATKVØÐURÆTTUR

***Atkvøðurætt hevur hvør bólkur við trimum atkvøðum fyri fyrstu 50 limirnar og síðan eina atkvøðu fyri hvørjar byrjaðar 25 limir.***

***Sami luttakari kann hægst atkvøða við trimum atkvøðum.***

***Fyri at kunna atkvøða á Landsfundinum, skal ein vera limur í KFUM-skótinum í Føroyum.***

***Brævatkvøður til landsfundin kunnu ikki góðkennast.***

***Limatalið verður ásett eftir tali á teimum limum, sum eru skrásettir í limaskipanini hjá samskipanini tann 31.12. 2023( farna fíggjaárð)***

***Mynstringarlistin, sum er sendur bólkaleiðaranum, skal fyllast út eftir skrásetta limatalinum 31.12.2023 við nøvnum og bústaðum á teimum persónum, sum kunnu atkvøða fyri bólkin á Landsfundinum. Mynstringarlistin skal latast inn í seinasta lagi, dagin áðrenn.***





## ATKVØÐUR HJÁ BÓLKUM

| | |
|---|---|
| Skótaliði Magnus Heinason | 3 Atkvøður |
| Skótaliði Gullbrandur | 3 Atkvøður |
| Skótaliði Leirvíks Páll | 3+2 Atkvøður |
| KFUM Skótanir við Løkin | 3 Atkvøður |
| Skótaliði Borgin | 3 Atkvøður |
| Skótaliði Túgvan | 3 Atkvøður |
| KFUM Skótanir í Kvívík | 3 Atkvøður |
| Skótalið KFUM´S | 3+4 Atkvøður |
| Skótaliði Royndin | 3 Atkvøður |
| Skótaliði Mikkjal á ryggi | 3 Atkvøður |
| Skótalið Nykurs rósa | 3 Atkvøður |
| Atkvøður tilsamans | 39 Atkvøður |




# FRÁGREIÐING FRÁ BÓLKUNUM

Á Landsfundinum er tíð sett av til bólkarnar at greiða frá arbeiði og fíggjarviðurskiftum sínum. Hetta er ein týðandi partur av Landsfundinum og eru ein tími settur av til endamálið.

Umráðandi er, at hvør einstakur bólkur fyrireikar sína framløgu væl og hvør bólkur fær **5 minuttir** til framløgu sína. Ein stutt frágreiðing skal gevast, sum lýsir dagliga arbeiðið í bólkinum og serstøk tiltøk, sum bólkurin hevur fyriskipað. Eisini verður greitt frá fíggjarviðurskiftum hjá bólkinum. Tað er serliga áhugavert at hoyra um ymisk tiltøk, sum bólkurin hevur skipað fyri ella hevur luttikið á hesi seinastu tvey árini. Umframt hetta er spennandi at vita, hvussu dagliga arbeiðið í einstøku liðunum verður skipað.

Møguleiki er fyri at nýta Power Point o.t. til framløguna. Best er, um frágreiðingin eisini er á skrift og kann handast skrivaranum á Landsfundinum, so at tað skjótt og lætt kann setast inn í fundarfrásøgnina.




# Frágreiðing frá

Síðan smoltstøðin bleiv seld í juni 2022, hava vit hugsavnað okkum um at seta skótadepilin í stand og gera tað hugnaligt á økinum. Tað hevur tó ikki verið so nógv virksemi á deplinum sum ætlað, orsaka av ótryggum fíggjarvánum. Endalig semja er nú gjørd um írestandi skuld og manglar við arbeiðstakaran, ið stóð fyri verkætlanini á Selatrað. Eisini er avtala gjørd við FRS um árliga stuðulin til samskipanirnar, soleiðis at vit nú vita, hvat vit hava at arbeiða við. Niðanfyri er ein samandráttur av arbeiðinum á Selatrað seinasta árið.

Hvíta húsið: Gamla frystiboksin er koyrd burtur, tí hon var hol. Nýggj køli- og frystiskáp eru sett upp í goymslurúminum í køkinum.

Toiletbygningurin: Ein leki varð staðfestur í einum vatnrøri til eina kummu. Gólvið bleiv brotið upp og rørið skift, so nú er alt í lagi aftur. Eisini eru nýggjar hurðar settar í toiletbygningin – bæði aftan og framman.

Toiletbygningurin hevur verið løstur fyri almennari nýtslu seinasta árið, tí tað hava verið ov nógvar óynsktar vitjanir á deplinum, har tað hevur verið framd vandalisma móti ognunum.

Útiøkið: Nýggj streymveiting er løgd niðan á skótadepilin og nýggj høvuðsstreymtalva er uppsett í goymslurúminum undir pallinum. Gamla streymtalvan var staðsett inni í reyðu lonini, ið nú er tikin niður. Framyvir skulu allar EL-leiðingar á deplinum verða førdar úr nýggju talvuni

Raftirnar: Enn er eingin loysn funnin á hóskandi goymslu til allar raftirnar á deplinum, ið liggja á bønum sunnanfyri toiletbygningin. Fleiri skótabólkar keyptu nýggjar raftir í summar, men skótadepilin skal ikki hava fleiri raftir, fyrr enn ein loysn er funnin á eini skilagóðari goymslu.

Skelti: Nýggj skelti, ið vísa til skótadepilin, verða sett niðri við hvørja av teimum báðum niðankoyringunum. Rammurnar eru liðugt framleiddar og skeltini verða sett upp í nærmastu framtíð.

Hoyløgan og goymslubygningurin: Goymslubygningurin sunnanfyri hoyløguna er komin nakað væl áleiðis.

Betongarbeiðið er liðugt og stórviðurin og sperrurnar eru nú uppsettar. Enn manglar framvegis nakað at gera, fyri at goymslubygningurin kann takast í nýtslu. Ætlanin er at nýta bygningin til ymsa útgerð, ið depilin hevur tørv á. Ætlanin er at nýta kjallaran í hoyløguni til verkstað, har arbeiðsborð verða sett upp og ymisk neyðug amboð eru at finna, ið skulu nýtast í samband við rakstur og viðlíkahald av deplinum.

Skýlið: Opni bygningurin omanfyri hoyløguna stendur framvegis óbroyttur, og nógv órudd er inni. Enn er eingin endalig loysn funnin á, hvussu hesin bygningur skal skipast og nýtast. Tosað hevur verið um at loysa bygningin nakað frá hoyløguni og at inniloka bygningin í ávísan mun.

Smátturnar: Nakað manglar framvegis at verða gjørt við smátturnar, áðrenn tær kunnu takast í nýtslu, so sum el-arbeiðið, girðin uppi á hemsuni, seta køkin upp, mála ymiskt uttandura, leggja flag á tekjurnar og gera aðrar smávegis snøklar. Grús gøtur skulu eisini gerast niðan til smátturnar. Ætlanin er at smátturnar skulu standa klárar til patrúljurnar at nýta í summar.

Arbeiðsvegur: Vegurin, frammanfyri pallin og móti portrinum til Úlvadalin, skal snøggast. Vegurin varð gjørdur í samband við at smátturnar vórðu settar upp við stórum kranabili. Ætlanin er at javna vegjaðararnar, so at teir fella betur inn í lendið. Ansast skal eftir at leiðingar til vatn, kloakk og el eru lagdar á skilagóðan hátt í lendið.

Bárður Toftum Petersen, landsnevndarlimur





# Innkomin Mál

**Eingin mál innkomin**

# Innkomnar broytingar til Grundlógina og viðtøkurnar

| | | |
|---|---|---|
| **1. Atkvøðurættur** | **Grundlóg** | **§15 stk 2** |
| **2. Bólkaráð** | **Grundlóg** | **§10 stk 5** |
| **3. Landsfundurin** | **Grundlóg** | **§15 stk 1.3** |
| **4. Útbúgvingarskipan** | **Viðtøka** | **§ 25 stk 5** |
| **5. Føroya skótaráð** | **Viðtøka** | **§ 24 stk 1** |
| **6. LPK** | **Viðtøka** | **§ 22** |
| **7. Landsnevndin** | **Viðtøka** | **§1 stk 9** |
| **8. Skótalið** | **Viðtøka** | **§9 stk 3** |

# Innkomnar Broytingar

## Evni: Ætkvøðurættur
## Stillari: Landsnevndin

| Verandi | Nýggja |
| --- | --- |
| **2. Atkvøðurætt hevur hvør bólkur við trimum atkvøðum fyri fyrstu 50 limirnar og síðan eina atkvøðu fyri hvørjar byrjaðar 25 limir. Sami luttakari kann hægst atkvøða við trimum atkvøðum.** | **2. Atkvøðurætt hevur hvør bólkur við trimum atkvøðum fyri fyrstu 50 limirnar og síðan eina atkvøðu fyri hvørjar byrjaðar 25 limir. Sami luttakari kann hægst atkvøða við trimum atkvøðum.**<br><br>***Landsnevndarlimur hevur ikki atkvøðurætt. Landsnevndarlimur kann ikki atkvøða fyri sín bólk tá viðkomandi hevur satið í LANDSNEVNDINI***<br><br>***Limir í undirnevndum hja KFUM-skótinum í Føroyum hava ikki atkvøðurætt, í málum sum hava við teirra undirnevnd at gera.*** |

**Evni: Bólkaráð**
**Stillari: Landsnevndin**

| Verandi | Nýggja |
|---|---|
| **5. Heldur bólkaráðið tað verða neyðugt, kann talið av limum økjast. Bólkaráðið skipar seg sjálvt við formanni og kassameistara, ið ikki er sami persónur, og útnevnir tveir grannskoðarar. Bólkaráðið eigur at hava regluligan fund minst tvær ferðir árliga, Annar fundurin skal vera sama ár sum Landsfundurin er í mars** | **5. Heldur bólkaráðið tað verða neyðugt, kann talið av limum økjast. Bólkaráðið skipar seg sjálvt við formanni og kassameistara, ið ikki er sami persónur, og útnevnir tveir grannskoðarar. Bólkaráðið eigur at hava regluligan fund minst tvær ferðir árliga, *Annar fundurin skal vera áðrenn Landsfundin sum er í februar.*** |

# Innkomnar Broytingar

## Evni: Landsfundurin
## Stillari: Landsnevndin

| Verandi | Nýggja |
|---|---|
| **3. Frágreiðing frá landsnevndini um virkið seinastu árini.** | **3. Frágreiðing frá landsnevndini um virkið *seinasta árið.*** |

# Evni: Útúgvingarskipanin
# Stillari: Landsnevndin

**Verandi**

**5. Skjaldarsveinur og venjingarskipanin**
**Skjaldarsveinur: Fyri at luttaka á Skjaldarsveinur skal ein í minsta lagi vera næmingur frá 4.-6. Flokk.**

**Í venjingarskipanini eru 3 stig.**
**Riddaravenjing: Fyri at luttaka á Riddaravenjing skal ein hava lokið skótaroyndina. Skótar, ið luttaka á Riddaravenjingum, skulu í minsta lagi vera 5. Floksnæmingar.**

**Krossriddaravenjing: Fyri at luttaka á Krossriddaravenjing skal ein hava staðið 2. Floksroyndina.**
**Eisini skal ein hava luttikið og fingið bæði heiðursbræv og prógv fyri Riddaravenjing.**
**Skótar, ið luttaka á Krossriddaravenjingum, skulu í minsta lagi vera 6. Floksnæmingar.**

**Paladin: Fyri at luttaka á Paladin skal ein hava staðið 1. Floksroyndina. Eisini skal ein hava**
**luttikið og fingið heiðursbrøv og merkir fyri Riddaravenjing og Krossriddaravenjing.**
**Skótar, ið luttaka á Paladin, skulu í minsta lagi vera 7. Floksnæmingar.**

**5: Skjaldrasveinur:**

**Árgangur:**
**Úlvar, sum ganga í 4. skúlaflokki og flyta upp til skótar.**

**Endamál:**
**Ein lega, har úlvar fáa møguleika at kenna til skótaarbeiði.**

**Arbeiðsháttur:**
**Lega frá fríggjakvøld til sunnudag. Arbeiðið fer fram í bandum við førara og hjálpara.**

**Innihald:**
**Gera mat á gasskøki – Kenna arbeiðsháttin "kunning" (Kort og Kumpas) – Signalering – kotur – Samstarv – Skótarørslan – Búreising**

**Luttakara krav: Hava tikið eina av hesum úlvaroyndum: Raksha – Baloo ella Akela**

**6. Riddaravenjingin:**

**Endamál:**
**Endamálið við riddara venjingini er, at skótar fáa eina fatan av hvat grundleggjandi skótakynstur er.**

**Luttøkukrøv**
**Kravi fyri at vera við á riddaravenjing:**

**1. Tú skalt hava tikið skótaroyndina**
**2. Tú skalt ganga í 5-10 flokki**

**7. Krossriddaravenjing:**

**Endamál**
**Endamálið við krossriddara venjingini er, at skótar læra at arbeiða í patrúljum. Og leggja skrá fyri sítt patrúlju virksemi.**

**Luttøkukrøv**
**Kravi fyri at vera við á Krossriddaravenjing:**

**1. Tú skalt hava tikið skótaroyndina**
**2. Tú skalt hava tikið Riddaravenjingina**
**3. Tú skalt hava tikið 2.flokks-royndina**
**4. Tú skalt ganga í 6-10 flokki**

**8.Paladin:**

**Endamálið við Paladinvenjingini er at læra skótarnar, í smáum bólkum, at klára seg sjálvar úti í Føroysku náttúruni.**
**Paladinvenjingin er staðið har skótarnir veruliga sleppa at royna síni skótakynstur. Legan er skipað sum ein heik har sovið verður í bivuak. Skótarnir verða lærdir at taka ábyrgd av sær sjálvum, hjálpa øðrum tá tað krevst, og at síggja seg sum ein part av eini heild.**
**Venjingin er í apríl/mei.**
**Kravið at sleppa við á Paladin-venjingina er at hava luttikið og fingið heiðursbrøv og merkir fyri Riddaravenjing og Krossriddaravenjing. at ein er I. Flokks skóti. Skótar, ið luttaka á Paladin, skulu í minsta lagi vera 7. Floksnæmingar.**

**Hvør er ein Paladin**
**Ein Paladin er serligur leiðari og tænari hjá kongi. Søguliga eru teir kendastu Paladin-stríðsmennirnir teir**
**tólv, ið vóru høgra hond hjá Karlamagnusi av Fraklandi. Hetta eru teir vit syngja um í kvæðnum**
**"Runsivalsstríðið". Eins og tá á døgum skal ein Paladin í dag kunna taka leiðsluna tá tað er neyðugt og**
**vera høgra hond í stríðnum fyri rættvísi og í verjuni av teimum ið tørva tí.**

**9. PF-Venjing:**
**Fyri at luttaka á PF-Venjing skal luttakarin vera Patrúljuførari ella patrúljuhjálpari. Umboðandi sín skótabólk.**
**Árgangur:**
**Patrúljuførar og patrúljuhjálparar sum ganga í 5 - 10. Skúlaflokki..**

**Endamál:**
**Ein venjing har skótarnir fáa innlit í Patrúljuarbeiðið**

**Arbeiðsháttur:**
**Lega frá fríggjakvøld til sunnudag. Arbeiðið fer fram í patrúljum við førara og hjálpara.**

**Innihald:**
**skrálegging,ábyrgdir,Dagbók,Skotahugsjónina,Patrúljufundir.**
**Trupuleikar í patrúljuni, Kristnikunnleiki, Heikir, Gongutúrar, Legur, hvat er ein førari og hjálpari v.m.**

**Luttakara krav: Vera Patrúljuførari og patrúljuhjálpari.**

**10. US-Venjing:**
**Árgangur:**
**8-9-10 skúlaár**

**Endamál:**
**Ein venjing har skótarnir fáa eitt bransdskeið og fyrstuhjálparskeið. Menna ungdómsskótaarbeiði.**

**Arbeiðsháttur:**
**Lega frá fríggjakvøld til sunnudag..**

**Innihald:**
**Brandskeið og fyrstuhjálparskeið**
**Dagbók og Ungdómsskótaarbeiðið**

**Luttakara krav:**
**Vera ungdómsskóti**

# Innkomnar Broytingar

**Evni: Føroya Skótaráð**
**Stillari: Landsnevndin**

| Verandi | Nýggja |
| --- | --- |
| **1. Víst verður til galdandi reglugerð fyri Føroya Skótaráð.** | **1. Víst verður til galdandi reglugerð fyri Føroya Skótaráð.**<br><br>***2.FSR kann ikki seta avgerðir í verk, sum ávirka leiðsluvenjingar og venjingarskipanina annars hjá KFUM-skótinum í Føroyum uttan so at Landsfundurin hevur einmælt góðtikið tað á Landsfundinum.***<br><br>***3. Skótaovastin er fastur limur í FSR***<br><br>***4. Ein limur verður valdur á landsfundinum til at sita í FSR eitt ár í senn.*** |

## Evni: LPK
## Stillari: Landsnevndin

**Verandi**

**2. LPK skal vera skipað í tveimum umførum: Fyrra umfar er patrúljukapping í dømunum, DPK1, sum verður framd ein leygardag ella eitt vikuskifti. Seinna umfar er patrúljukapping, LPK2, sum verður skipað sum in tjaldlega eitt langt vikuskifti. Allar patrúljur, sum hava verið við til DPK, kunnu verða við til LPK. Tó kann virknisnevndin gera undantaksloyvi til luttøku á LPK, um ein patrúlja av góðum orsøkum berst frá at luttaka á DPK. Skuldi tað komi fyri, at ein patrúlja, ið hevur luttikið á DPK, ikki fær verið fullmannað til LPK, kann virknisnevndin loyva, at limir verða tiknir úr ikki luttakandi patrúljum.**

**3. LPK skal verða skipað sum ein 5-dystur og halda støði soleiðis, at tað krevur at skótarnir duga síni skótakynstur.**

**4. LPK-vinningurin:**
**1. Virknisnevndin skal fáa til vega ein hóskandi vinning.**
**2. Fyri at ein patrúlja skal ogna sær vinningin, skal hon vinna LPK 3 ár á rað ella 5 ár tilsamans.**
**3. Virknisnevndin hevur á hvørjum ári ábyrgd av at merkja LPK-vinningin við árstalið, navni og heimstaði hjá vinnarapatrúljuni.**
**5. US-LPK kann verða samstundis sum LPK og á sama stað.**

**6. Tey árini, tá ið onnur stór landstiltøk eru, kann LPK fella burtur.**
**DPK = DømisPatrúljuKapping LPK2 = LandsPatrúljuKapping**

## Nýggja

**2. LPK skal vera skipað í tveimum umførum: Fyrra umfar er patrúljukapping í dømunum, DPK , sum verður framd ein leygardag ella eitt vikuskifti. Seinna umfar er patrúljukapping, LPK , sum verður skipað sum ein tjaldlega á Hvítusunnu.**

**6. Tey árini, tá ið onnur stór landstiltøk eru, kann LPK fella burtur.**
**DPK = DømisPatrúljuKapping**

***LPK = LandsPatrúljuKapping***

# Innkomnar Broytingar

## Evni: Landsnevndin
## Stillari: Landsnevndin

**Verandi**

**9. Landsnevndin kann seta fólk í starv hjá samskipanini og ásetur arbeiðsøki teirra.**

**Nýggja**

**9. *Landsnevndin kann seta fólk í starv um ein meiriluti av bólkunum á einum Landsfundi ynskja tað. Landsnevndin hevur ábyrgd av setarnartilgongd. Starvsfólk skal vera sett sambært sáttmála hjá Samverk. Landsnevndin ásetur arbeiðsøki.***

# Innkomnar Broytingar

## Evni: Skótalið
## Stillari: Landsnevndin

| Verandi | Nýggja |
| --- | --- |
| **3. Arbeiðiði í skótaliðinum er grunda á venjingaskipana.** | ***3. Arbeiðiði í skótaliðinum er grunda á Venjingaskipana " Skótin og patrúljan"*** |

# VÆLKOMIN
# Á
# LANDSFUND
# 2024